

Starvslýsing

# Ert tú okkara nýggi uttanríkispolitiski ráðgevi?

**Toymið um løgmann er sett saman av dugnaligum ráðgevum í búskapi, løgfrøði, innlendismálum og uttanríkismálum. Løgmansskrivstovan leitar nú eftir einum nýggjum spælara til toymið, og bjóðar eitt spennandi starv sum ráðgevi í uttanríkispolitiskum málum. Talan er um eitt tíðaravmarkað starv, sum kann verða broytt til varandi setan.**

## Stutt um starvið

Tín leiklutur verður at ráðgeva løgmanni í uttanríkispolitiskum viðurskiftum og at vera bindilið millum Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð, ið varða av uttanríkispolitikki. Leikluturin hevur kjarnuuppgávur, sum fevna um samskifti við danska forsætismálaráðið, nærlagda kunning um áleikandi uttanríkispolitisk mál og at fyrireika vitjanir hjá løgmanni uttanlands. Tað verður somuleiðis tín ábyrgd at taka ímóti spurningum frá landsstýrisfólkum, Løgtinginum ella fjølmiðlum um uttanríkismál.

## Faklig førleikakrøv

Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni á master- ella kandidatstigi, og góðan kunnleika um uttanríkispolitikk og samfelagsviðurskifti. Harafturat er tað ein fyrimunur, um tú hevur starvsroyndir frá politiskari fyrisiting ella øðrum, ið kann sammetast.

## Persónlig førleikakrøv

Vit ímynda okkum, at tú:

· Hevur góð greiningarevni
· Ert ágrýtin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt
· Hevur politiskt tev
· Hevur góðar munnligar og skrivligar samskiftisførleikar í føroyskum, donskum og enskum
· Dugir væl at samstarva og røkja sambond

## Løn og setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Ítøkiliga flokkingin verður ásett eftir útbúgving og royndum. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna, hini stjórnarráðini og stovnar undir stjórnarráðunum. Tænastustaðurin er í løtuni Løgmansskrivstovan.

## Umsókn

Umsókn við upplýsingum um útbúgving, lívsrensl og øðrum skal sendast til starv@tinganes.fo.

Starvið verður sett 1. desember ella eftir nærri avtalu. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin *16. oktober 2023 kl. 12.00.*

*Um tú ynskir at hoyra meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til John Rajani, løgmansstjóra, á johnr@tinganes.fo ella 555016.*